BYGDARSKÚLIN

# Kalla ein skúla

## Mugu ikki ganga við bindi fyri eyguni

**- Tað er í lagi, at ávísir skúlar verða umskipaðir, men at niðurleggja miðalstórar bygdaskúlar gevur onga meining, og er heldur ikki so einfalt, slær Nita Næs fast**

BYGDARSKÚLIN
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Sandvík:** Einalærarin í Sandvík vísir á, at einhvør broyting á fólkaskúlaøkinum má taka útgangsstøði í, hvat er best fyri næmingarnar, og broytingarnar mugu verða knýttir at námsfrøðiligum atlitum, hugsjónum – sum greitt vísa á nakað betur, enn tað er í dag.

- Ein bygdaskúli sum tann í Sandvík verður niðurlagdur av sær sjálvum, tí har eru eingi børn. Eg meti tó, at skúlabygningurin í Sandvík kann gerast ein partur av Hvalbiar skúla og framhaldandi hava eina funktión, vísir hon á.

Veruleikin er, at kommunurnar eiga skúlabygningarnar, innbúgvið, og um ein skal siga leiðarum ella lærarum, sum eru tænastumenn við ávísar skúla úr starvi, kann tað koma at kosta landinum nógv.

Nita hevur hinvegin sett sær spurningin: Hví so stórar broytingar skulu henda á fólkaskúlaøkinum júst nú, tá tíðirnar eru ringar?! Hetta gevur henni eitt sindur kaldar føtur, og hon vónar ikki, at tann einstaki fólkaskúlanæmingurin kring landið skal svíða fyri, at vit sum samfelag ikki hava siðvenju í langtíðarraðfestingum, og tí mangla pengar á øllum økjum, eitt nú til eftirútbúgving, NSR –tænastur, tvílæraraskipan o.a.

- Vit ganga líkasum við bindi fyri eyguni og droyma um, at alt verður betur, tá vit verða sjey stórar kommunueindir. Nú er so tíðin komin til fólkaskúlin, sum skal tillagast framtíðar kommununum. Harvið verður tímajáttanin umløgd til at verða játtað økjum, og ikki sum í dag tí ávísa skúlanum.

- Skulu vit hava eins góð skúlatilboð kring landið, so er tað av stórum týdningi, at tað er landið, sum framhaldandi umsitur fólkaskúlan. Mín vón er, at almenni myndugleikin og kommunurnar hava eina fatan av, at skulu vit umsita og viðgera fólkaskúlarnir eins kring landið, so mugu vit samstundis umsita og viðgera teir ymiskt, sigur Nita Næs at enda.

## FAKTA

**14 skúlar við undir 10 næmingum**
Sambært einum yvirliti frá Mentamálaráðnum eru ikki færri enn 14 skúlar við færri enn 10 næmingum kring landið hetta skúlaárið.

**Hesir skúlar eru:**
- Fámjins skúli við trimum næmingum
- Funnings skúli við trimum næmingum
- Funningsfjarðar skúli við átta næmingum
- Gjáar skúli við trimum næmingum (er nú stongdur fyri well)
- Haraldsunds skúli við seks næmingum
- Hovs skúli við tveimum næmingum
- Húsar/Syðradals skúli við sjey næmingum
- Húsavíkar/Dals skúli við tveimum næmingum
- Kirkju/Hattarvíkar skúli við trimum næmingum
- Kolturs skúli við tveimum næmingum
- Kunoyar skúli við fimm næmingum
- Mykines skúli við tveimum næmingum
- Skálavíkar skúli við seks næmingum
- Tjørnuvíkar skúli við fimm næmingum

Nevnast kann, at tað finnast aðrir smærri skúlar, sum ikki eru við í hesum yvirlitinum.



*Tað eru bert tríggir næmingar við skúlan í Sandvík – tveir í 4. flokki og ein í 5. flokki. Spurningurin er, um teir verða seinastu næmingarnir við Sandvíkar skúla. Her eru tey útferð í fjøllunum við Nes bygd í baksýni*

**- Tað er ein sannroynd, at á stórum skúlum er vandin fyri at missa ein næming burturímillum altíð til staðar. Mín avbjóðing sum einalærari er at varðveita og menna tað íborna forvitnið hjá tí einstaka næminginum, sigur Nisa Næs, einalærari við Sandvíkar skúla**

BYGDARSKÚLIN
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Sandvík:** - Tað er kortini torført at seta fyrimunir og vansar upp ímóti hvørjum øðrum, tá tosað verður um skúlaskap, slær Nita fast.

Hon starvast sum lærari við ein av minstu skúlunum í landinum, Sandvíkar skúla har tað hetta skúlaárið ganga tríggir næmingar – tveir dreingir í 4. flokki og ein genta í 5. flokki.

Og Nita Næs hevur sjálvandi gjørt sær sínar hugsanir, um ætlanina at gera fleiri størri skúlaeindir kring landið. Ein skúli, sum kann verða raktur av hesi ætlanin er júst tann 120 ára gamli skúlin í Sandvík.

Sambært einum uppskoti frá mentamálaráðharranum, Helenu Dam á Neystabø er støðan púra greið: Teir smáu skúlarnir kunnu ikki útvega næmingunum eitt nóg fjøltáttað tilboð til undirvísingina. Tí er neyðugt at umskipa føroysku skúlarnar við virknaði frá skúlaársbyrjan 2011.

- Eg havi kortini einki ímóti at broytingar fara fram innan skúlaøkið, sigur Nita Næs í hesi samrøðuni við Sosialin.

### Kendur skúli

Nita Næs dugir væl at síggja, at tað sum kann vera ein fyrimunur hjá henni sum lærara í Sandvík, kann møguliga vera ein vansi á einum øðrum lítlum skúla. Og nakað, sum er ein fyrimunur á einum stórum skúla, er møguliga ein stórur vansi á einum øðrum stórum skúla.

Ein av spurningum í hesum sambandi er tíðin, - hetta, at hava tíð til hvønn einstaka næming er altíð nøktandi fyri ein lærara. Um ein kann rópa tað ein fyrimun, dugir hon ikki rættiliga at siga.

- Stóra avbjóðingin hjá einum og hvørjum lærara er altíð at finna vegin inn til, hvussu hvør einstakur næmingurin lærir, og hvussu lærarin megnar at motivera júst hendan ella handan næmingin, soleiðist at íborna forvitnið til lívið varðveitist og mennist.

- Tað kann hugsast, at tað er lættari gjørt á einum lítlum ella miðalstórum skúla, enn í einum flokki við t.d. 48 næmigum, greiðir Nita frá.

Størsta avbjóðingin hjá henni sum einalærari er at geva næmingum eitt eins gott skúlatilboð, sum tey annars høvdu fingið á einum skúla við fleiri lærarum og fleiri floksfeløgum.

Í Sandvík er eitt tætt